**Tjóðveldi**
**Sjálvstýrisflokkurin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 107/2009: Uppskot til samtyktar um lóg um keyp av fastari ogn og lóg um meklaravirksemi**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um sum skjótast at fyrireika og leggja fram alla neyðuga lóggávu kring keyp og sølu av fastari ogn og kring húsameklaravirksemi.

**Viðmerkingar**
Keyp og søla av fastari ogn er eitt lógarøki, sum er ógvuliga leysliga skipað í Føroyum. Stórur tørvur er á lóg, sum lýsir øll rættindi og allar skyldur hjá seljara og keypara við sølu og keypi av fastari ogn. Slík lóg verjir sostatt bæði keypara og seljara.

Størsta íløgan hjá allar flestu familjum er sethús ella annar fastur bústaður. Talan er í flestu førum um keyp fyri milliónina ella meira. Seinastu 10 árini ella so er keyp og søla av fastari ogn í alsamt størri mun farin fram gjøgnum meklarafyritøkur av ymiskum slagi, har ein meklari átekur sær at umboða bæði seljara og keypara í sambandi við keyp og sølu av fastogn. At selja fasta ogn fyri onnur er at átaka sær stóra ábyrgd. Men í Føroyum er eingin lóg, sum greitt regulerar meklaravirksemi.

Í summum førum fær keyparin eina beinleiðis falska trygd við at keypa gjøgnum meklara, tí her roknar hann sjálvandi við, at trygdin er í lagi. Til dømis kann hann fáa ta fatan, at støðulýsing er gjørd av ognini, hóast lýsingin bert byggir á upplýsingar frá seljaranum sjálvum. Slíkar støðulýsingar kunnu vera verri enn einki. Til ber vanliga eisini at keypa meira fakliga grundaðar støðulýsingar av ognini, men ógreitt er, hvørji krøvini eru til støðulýsingarnar, og hvør ábyrgd fylgir eini slíkari.

Við lógini um fastognarkeyp kann verða ásett krav um trygging. Tað ber í sær, at seljari hjá einum tryggingarfelag stovnar trygging uppá, at húsini eru í einum ávísum standi, og ikki detta niður tey næstu 20 árini. Tryggingarfelagið fær tá áhuga í, og setir krøv um, at støðumetingar lúka ávís krøv.

Rættarhjálp Føroya viðgerð árliga á leið 45-50 mál, ið snúgva seg um keyp og sølu av fastari ogn.

Økið keyp og søla av fastari ogn og um meklaravirksemi er væl skipað í okkara grannalondum. Við støði í lógum, sum virka í Norðurlondum, eigur at bera til rímiliga smidliga at smíða eina føroyska lóggávu. Neyðugt er tó at leggja dent á, at lóggávan hóskar til okkara fastognaviðurskifti og marknað.

Brúkaraumboðið er løgfrøðiligur stovnur, og kann hesin fáa ábyrgdina av at smíða lóggávuna í samstarvi við løgfrøðina í Vinnumálaráðnum. Eisini kann Brúkaraumboðið umsita lógirnar um keyp og sølu av fastari ogn, og um meklaravirksemi. Á henda hátt kann bæði lóggáva verða smíðað og lógirnar umsitast, uttan at tað nýtist at kosta landsskassanum eyka. Á henda hátt verður ábyrgdarøkið hjá Brúkaraumboðnum eisini víðkað.

**Á Løgtingi 25. februar 2010**

Bjørt Samuelsen
løgtingskvinna

Kári á Rógvi
løgtingsmaður